Eysturkommuna

**NEVNDARFUNDUR**

**Býráðið**

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.06.2019 kl. 20:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen |
| Vara limir: | Marita Klein Joensen |
| Ikki møtt: | Fríðgerð Heinesen |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 45/19 | 19/00047-1 | Mál 19/00047 Bátabrúgv í smábátahavnini undir Gøtueiði (innari partur) | 3 |
| 46/19 | 19/00078-3 | Tilmæli og frágreiðing - liðugtgerð av víkingahúsinum | 5 |
| 47/19 | 19/00119-46 | Tilmæli - Útstykking í Norðragøtu - Framhald 17/00470 | 8 |
| 48/19 | 19/00263-1 | Tilmæli - Broyting av byggisamtykt Undir Gøtueiði 2019 | 10 |
| 49/19 | 19/00283-2 | Tilmæli - Byggisamtykt - Neystaøki í Norðragøtu | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50/19 | 19/00310-1 | Mál 19/00310 KT í skúlanum í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli | 13 |
| 51/19 | 19/00396-4 | Frágreiðng og tilmæli til mál nr. 19/00396 – Demensheim | 15 |
| 52/19 | 19/00397-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00397 – Endurmenningareind | 16 |
| 53/19 | 19/00413-1 | Mál 19/00413 uppmáting við dronu av havnalagnum í Leirvík. Málslýsing og tilmæli. | 19 |
| 54/19 | 19/00417-3 | Mál 19/00417 Umsókn um vinnustykki til gistingarhús. Málslýsing og tilmæli | 21 |
| 55/19 | 19/00432-12 | Sáttmáli um skúlasamstarv við Fuglafjarðar kommunu – endurskoðaður | 23 |
| | | | |

**45/19 Mál 19/00047 Bátabrúgv í smábátahavnini undir Gøtueiði (innari partur)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | | | 19/00047-1 |
| 2 Vinnunevndin | 13.06.2019 | 20/19 | 19/00047-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 40/19 | 19/00047-1 |
| 4 Býráðið | 24.06.2019 | 45/19 | 19/00047-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna er farin undir eitt ruddingarátak á almennum økjum, og vit eru byrjaði undir Gøtueiði. Her liggja í løtuni nakrar flótibrúgvar, sum fylla rættiliga væl í landslagnum. Vansin við flótbrúgvunum er, at so leingi tær liggja á landi, so síggja tær út sum órudd, og samsvarar hetta tí ikki við ruddingarátakið í Eysturkommunu.

Ætlanin við flótibrúgvunum hevur verið, at tær skulu brúkast til innara part av báthylinum. Í 2016/17 blivu partar av somu flótibrúgvum lagdar út við uttara part av bátahylinum, og sær hetta arbeiðið snøkt út. Í løtuni liggja tríggir stórir bátar framvið flótbrúgvunum.

Tilboðið fyri arbeiðið í 2016/17 var 290.521 kr. + 65.000 kr. fyri ráðgeving.
Samanlagt bleiv fylgjandi játtað til hetta arbeiðið:
150.000 kr. av konto hjá Kongshavnar havn
100.000 kr. sum eykajáttan
100.000 kr. sum eykajáttan

Væntast skal, at kostnaðurin fyri at leggja bátabrúgv við innara part av bátahylinum verður áleiðis tann sami, men neyvan hægri.

Sbrt. roknskapinum hjá Kongshavnar havn hevur Eysturkommuna áleið 151.000 kr. tøkar til verkætlanir undir Gøtueiði. Upphæddin í Kongshavnar havn kann einans brúkast til havnarlagið undir Gøtueiði, og umsókn skal sendast inn til Kongshavnar havn um møguligar verkætlan.

**Ískoyti 11. Juni**
Økið kring bátahylin undir Gøtueiði er skilmarkað sum C1-øki (vinnu- og miðstaðarbygging). Umframt bátarnir, so eru goymsluhølir og neyst (eitt við íbúð) á økinum. Harumframt verður økið eisini brúkt til at seta vinnutól á. s.s. maskinur hjá entreprenørum.

Kommunan merkir í løtuni, at tað er stórt trýst á at fáa øki at seta síni vinnutól á. Eftirspurningur er eisini eftir at sleppa at seta vinnutól við bátahylin undir Gøtueiði. Í løtuni liggja tó bátabrúgvar á einum øki, sum upprunaliga er sett av til at seta vinnutól á. Bátabrúgvarnar fáa vit ókeypis, men so leingi tær liggja á landi, síggja tær út sum órudd, og lokala vinnan ynskir tær burtur. Sostatt krevst, at avgerð verður tikin um bátabrúgvarnar skulu brúkast ella ikki.

Eigarin av neysti í bátahylinum undir Gøtueiði ynskir, at bátabrúgvarnar verða brúktar nú, ella verða tær fluttar. Eigarin sær stórar møguleikar í at gera økið til eitt meira maritimt øki, og hevur eigarin eisini ætlanir um at skipa fyri "bátatreffi" undir Gøtueiði. Í hesum sambandinum hevur eigarin søkt um at stilla ein WC-vogn permanent á økið, sum sostatt kann brúkast til alment WC.

Umsitingin hevur kanna um, um nakar eftirspurningur er eftir bátaplássi undir Gøtueiði. Í løtuni er tað ringt at siga, men spurningurin er, um vit ikki skulu vænta at eftirspurningurin veksur tá Skálafjarðartunnilin opnar, ella um viðurskiftini hjá bátaeigarum blíva betri enn tey eru í dag.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Í samb. við fíggjarætlanararbeiðið seinasta heyst, bleiv kostnaðarmeting gjørd av at leggja tríggjar flótibrúgvar í innara hylin undir Gøtueiði. Kostnaðurin verður á leið **525.236.25 kr. v/mvg**.
Her skal samstundis sigast, at sbrt. roknskapinum hjá Kongshavnar havn, hevur Eysturkommuna áleið **151.000 kr**. tøkar til verkætlanir undir Gøtueiði.

**Tilmæli**

Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti til tilmæli 11. Juni 2019**
Áhugamálini eru ymisk fyri økið kring bátahylin undir Gøtueiði. Onkur vil hava økið til eitt vinnuøki burturav, og annar vil hava økið til eitt maritimt øki burturav.
Mælt verður tí til, at avgerð verður tikin um hvat við vilja við bátahylinum undir Gøtueiði. Skal t.d. vinnan sleppa betur inn at brúka økið, ella skulu vit víðka um bátaplássið, so økið blívur eitt meira maritimt økið.

**Viðtøka Vinnunevndin 13. juni 2019**
Vinnunevndin mælir til at økið verður ruddað, og brúkt til vinnuøki sum upprunaliga ætlað.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at flótibrúgvarnar verða lagdar út, og at peningur verður avsettur til hetta á fíggjarætlanini fyri 2020.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Tollakur Joensen sett fram broytingaruppskot:

"Mælt verður til at flótibrúgvarnar verða lagdar út beinanveg, og at eykajáttan verður veit til arbeiðið".

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Tollak Joensen, og varð tað einmælt samtykt.

## 46/19 Tilmæli og frágreiðing - liðugtgerð av víkingahúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.05.2019 | 47/19 | 19/00078-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.05.2019 | 36/19 | 19/00078-3 |
| 3 Býráðið | 27.05.2019 | 38/19 | 19/00078-3 |
| 4 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 41/19 | 19/00078-3 |
| 5 Býráðið | 24.06.2019 | 46/19 | 19/00078-3 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini fyri 2017, eru 2,5 mió. kr. avsettar til at inrættað ovaru hædd í Víkingahúsinum. Tekning av ovarahædd bleiv gjørt tá húsið vaðr teknað (í 2005/2006). Eftirfylgjandi er so komið upp at venda, um møguliga at broyta innrættingina, og hevur Víkingur sent kommununi skriv hesum viðv. E.M ráðgeving hevur gjørt eina nýggja "fyribils tekning" har innrættingin verður broytt sambært ynskjunum hjá Víkingi. Áðrenn arbeiðið verður bjóða út má støða takast til hvørja tekning húsið skal gerast eftir.

**Ískoyti 10. maj 2019**

Arbeiðið at innrætta ovaru hædd í Sarpugerði varð bjóðað í trimum arbeiðstøkum. Tað var timburarbeiðið, HVS og EL. Tey tilboðini, sum eru komin inn eru:

Inn eru komin tvey tilboð til timburarbeiðið. Lægsta tilboðið er frá Sp/f – Byggimeistarin Thomsen áljóðandi 2.498.048,61 kr. uttan MVG
Kostnaðarmetingin fyri timburarbeiðið var: 2.351.840,00 uttan MVG

Inn eru komin 3 tilboð til HVS arbeiðið. Lægsta tilboðið er frá SVT 1.057.413 kr. uttan MVG
Kostnaðarmetingin fyri HVS var: 929.550 kr. uttan MVG

Tilboð upp á EL-arbeiðið koma inn mánadagin 13. maj 2019.
Fylgjandi fyritøkur eru bodnar við: EL-Teknik, EL-talvuvirkið, EL-con og TTS

Afturat hesum koma byggiharraveitingar s.s. óvæntaðar útreiðslur, byggileiðsla, fakeftirlit, og arbeiðstøkutrygging.

**Ískoyti 13. maj 2019**

Lisitatión hevur verið og trý tilboð komu inn. El-verkfrøðingur hyggur ígjøgnum tilboðini og kemur við einari innstilling.
Tilboðini eru tætt við kostnaðarmetingina, sum er 1.276.000 kr. uttan MVG
Miðað verður ímóti, at innstillingin kemur áðrenn komandi fund í Fíggjarnevndini.

**Ískoyti 21.05.2019**

Lægsta tilboð fyri El arbeiði er frá TTS og er ájóðandi 1.138.926 kr. u/mvg.
Metingin var 1.276.000 kr. u/mvg.

Leggjast skal afturat, at gólvið í salinum ikki var við í útbjóðingini. Tað kostar 300.000 kr. u/mvg.

| |
|---|
| Tað merkir at handverkara útreiðslurnar fyri hesa verkætlan er: 4.994.387 kr. u/mvg.<br><br>Afturat hesum koma byggiharraútreiðslur, óvæntaðar útreiðslur, byggileiðsla, fakeftirlit, arbeiðstøkutrygging.<br><br>Samlaði kostnaðurin er sostatt mettur til at verða 6.286.564 kr. u/mvg.<br><br>**Ískoyti 17.06.19**<br>Á seinasta býráðsfundi tann 27/5-19 bleiv samtykt at veita eykajáttan til arbeiðið á 4,7 mió. kr. |
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eingin kostnaðarmeting er gjørd av arbeiðinum, men tað eru 2,5 mió. kr. avsettar til arbeiðið.<br><br>**Ískoyti 10. Maj 2019**<br>Íløgujáttanin fyri ítróttarøkið í Sarpugerði 2019 er 2.100.000 kr.<br><br>**Ískoyti 21.05.19**<br>Verkætlanin er mett at kosta 6.286.564 kr. u/mvg.<br><br>**Ískoyti 17.06.19**<br>Á seinasta býráðsfundi tann 27/5-19 bleiv samtykt at veita eykajáttan til arbeiðið á 4,7 mió. kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at býráðið tekur støðu til hvørja tekning húsið skal gerast eftir, og at arbeiðið so verður bjóða út.<br><br>**Ískoyti 10. maj 2019**<br>Mælt verður til at veita eykajáttan til endamálið. |

**Viðtøka Mentanarnevndin 13. maj 2019**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at veita eykajáttan til endamálið.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 21. maj 2019**
Figgjarnevndin mælir til at taka av lægstu tilboðunum sum eru frá Byggimeistaranum Thomsen, SVT og TTS. Fíggjarnevndin mælir eisini til at veita eykajáttan á 4.700.000,00 kr.

**Viðtøka Býráðið 27. maj 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 4,7 mió. kr. eins og samtykt við 1.viðgerð.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Einmælt samtykt eins og við 1.viðgerð.

## 47/19 Tilmæli - Útstykking í Norðragøtu - Framhald 17/00470

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.06.2019 | 21/19 | 19/00119-46 |
| 2 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 42/19 | 19/00119-46 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 47/19 | 19/00119-46 |

| Málslýsing: |
|---|
| Arbeiði at gera Útstykkingina í Norðragøtu bleiv bjóða út 09.04.2019.<br><br>Mánadagin 27. mai 2019, kl. 14, var lisitatión hildin.<br><br>Í samband við útboðið vóru 8 arbeiðstakarar bodnir at vera við at bjóða. Hesir arbeiðstakarar eru<br>RTS Contractors, JHR Entreprenørar, Kreton, Articon, J&K Petersen, Kanjon, Hermann Dalheim og<br>Oscar Poulsen.<br><br>Fimm arbeiðstakarar lótu tilboð inn. Hinir bóru seg undan at bjóða, áðrenn lisitatiónina.<br>Teir ið lótu tilboð inn, vóru hesir:<br>- Kanjon<br>- RTS Contractors<br>- Articon<br>- J&K Petersen<br>- JHR Entreprenørar<br><br>Vit hava gjøgnumgingið innkomin tilboð fyri at staðfesta, um tey lýka treytirnar, ið settar eru.<br>Øll tilboðini eru at meta, sum góðtikin at lúka ásettu treytir.<br><br>Kostnaðarmetingin var 7.750.000 kr. u/mvg.<br>Kanjon hevði lægsta tilboðið, tað er áljóðandi **11.487.312 kr. u/mvg.**<br><br>Viðmerkingar:<br>Í samband við gjøgnumgongdina av tilboðunum, eru vit blivnir varugir við, at nøgdin er ov stór í tí<br>eina postinum, sum viðvíkur Ø160 rørleiðing.<br>Nøgdin í nøgdarlistanum er sett til 2.199 lbm., til ein samlaðan kosta áljóðandi 1.429.269.- fyri hendan postin. Nøgdin í nøgdarlistanum skuldi vera 1.199 lbm., sum gevur eina upphædd áljóðandi 779.350 kr. u/mvg.<br>Asfalt var heldur ikki við í útbjóðingini. |

| |
|---|
| Kostnaður samanumtikið:<br>Lisitatiónskostnaðurin minus rættingina í pos. 4.1.2, gevur eina upphædd áljóðandi 11.487.312 kr. – 779.350 kr. = **10.707.962 kr. u/mvg**.<br><br>Afturat hesum kemur eftirlit og byggiharraveitingar.<br><br>Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina, verður sostatt 14.251.000 kr. u/mvg.<br><br>Byggitíðin er sett at taka áleið 11 mdr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Verkætlanin kemur at kosta 14.251.000 kr. u mvg. og kemur at koyra yvir tvey fíggjarár.<br>Játtanin á fíggjarætlanini 2019 til hesa verkætlan er 8.000.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka av tilboðinum hjá Kanjon og seta arbeiði í gongd. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 17. juni 2019**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**48/19 Tilmæli - Broyting av byggisamtykt Undir Gøtueiði 2019**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.03.2019 | 11/19 | 19/00263-1 |
| 2 Býráðið | 25.03.2019 | 26/19 | 19/00263-1 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 48/19 | 19/00263-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vísandi til møguligar verkætlanir, sum skulu í gongd, er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri eitt ávíst økið Undir Gøtueiði.<br><br>Partur av økið H: frílendi og J: Landbúnaðarøki verður broytt til øki D: Havnaøki, víst verður til viðfestu tekning.<br><br>**Ískoyti 19.06.2019**<br>Eftir at broytingin í byggisamtyktin hevur ligið alment frammi hevur kommunan móttikið 2 mótmælir/áheitanir, og verða hesar lagdar til býráðið til viðgerðar vísandi til Býarskipanarlógina. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fíggjarligu avleiðingar eru mettar til 20.000 kr. tað fevnir um broyting í tekningum og kostnaður til Umhvørvisstovuna. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri økið Undir Gøtueiði, frá øki H: frílendi og J: Landbúnaðarøki til øki D: Havnaøki. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 21. marts 2019**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 25. marts 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Einmælt samtykt at taka mótmæli viðv. matr. nr. 277a, 279a, 286a, 287a, 290a, 327a og 334a til eftirtektar, soleiðis at byggisamtyktin fyri økið niðanfyri landsvegin frá Tjørnunesi og suðureftir ikki verður broytt, frá landbúnaðarøkið til vinnuøkið. Annars verður hildið fast við samtyktina á býráðsfundi tann 25. mars 2019.

Til mótmæli viðv. matr nr. 333, verður víst til at Eysturkommuna hevur boða Tjóðsavninum frá evt. forminni á staðnum.

Eysturkommuna

## 49/19 Tilmæli - Byggisamtykt - Neystaøki í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.03.2019 | 14/19 | 19/00283-2 |
| 2 Býráðið | 25.03.2019 | 28/19 | 19/00283-2 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 49/19 | 19/00283-2 |

**Málslýsing:**

Ásetingin fyri Neystaøki í Norðragøtu skal broytast.

Broyting í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu

Ískoyti til: **§ 15. Ásetingar fyri økið G2: Neysta- og vinnuøki við serstakari byggisamtykt.**

*Stk. 6 Neystaøkið G2, íroknað Tyrlhúsgrundin og suðeftir, millum Tollaksgøtu og Tróndargøtu*

*verður umfatað av eini serstakari byggisamtykt sum víst í kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1 og tekstin niðanfyri:*

1. *Grundøkið, ið eru umfatað av serstøku byggisamtyktini, er partur av matrikul 187a í Norðragøtu.*

2. *Neyst í Tyrlhúsgrundini, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 5,50 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

3. *Neyst í øki 1, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 5,50 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

4. *Neyst í øki 2, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 6,00 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

5. *Neyst í øki 3, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 7,00 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

*Hæddin á gólvinum, verður ásett av byggimyndugleikanum.*

**Ískoyti 19.06.2019**

| |
|---|
| Eftir at broytingin í byggisamtyktin hevur ligið alment frammi hevur kommunan móttikið 2 mótmælir/áheitanir, og verða hesar lagdar til býráðið til viðgerðar vísandi til Býarskipanarlógina. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

Fíggjarligu avleiðingar eru mettar til 20.000 kr. tað fevnir um broyting í tekningum og kostnaður til Umhvørvisstovuna.

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri "Neystaøkið G2, íroknað Tyrlhúsgrundin og suðeftir, millum Tollaksgøtu og Tróndargøtu", eftir lýsingini í tekstinum omanfyri. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 21. marts 2019**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitigini.

**Viðtøka Býráðið 25. marts 2019**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Við tí ískoyti at neystini kunnu í mesta lagi verða 10,5 metrar lang, og at byggilinjan verður sett av kommununi.

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Fríðgerð Heinesen, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Per Martin Gregersen.

**Atkvøður blankt:**
Jóhan Christiansen.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Jóhan Christiansen mælir til at mótmælini verða tikin til eftirtektar, soleiðis at Tyrlhúsgrundini verður fríøkið, og 3 tey næstu neystini verða í mesta lagi 5 metrar høg. Annars verður hildið fast við samtyktin frá býráðsfundinum frá 25. mars 2019.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Jóhan Christinsen, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christinasen, Gudny Langgaard og Árni Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim, Uni Rasmussen, Tollakur Joensen, Marita Klein Joensen, Brandur Jacobsen.

## 50/19 Mál 19/00310 KT í skúlanum í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.04.2019 | 46/19 | 19/00310-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2019 | 31/19 | 19/00310-1 |
| 3 Býráðið | | | 19/00310-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 21.05.2019 | 39/19 | 19/00310-1 |
| 5 Býráðið | 27.05.2019 | 42/19 | 19/00310-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 43/19 | 19/00310-1 |
| 7 Býráðið | 24.06.2019 | 50/19 | 19/00310-1 |

**Málslýsing:**

Nýggja skúlaleiðslan í Eysturkommunu hevur víst á, at skúlin er afturúrsilgdur tá tað kemur til KT. KT-talvurnar sum eru í skúlanum eru minst 10 ár, og rigga sera illa.

Í hesum sambandinum hevur skúlin biðið um tvey tilboð frá Formula. Tilboðini eru upp á KT-talvur v/seperatum touch-skermum og Ipadar/Chromebook. Annað tilboðið er, at íløgan gongur yvir 3 ár, og hitt tilboðið er at keypa alt í einum.

Orsøkin til at skúlin bert hevur biðið um tilboð frá Formula er, at íflg. KT-vørinum hjá skúlanum, so hevur Nema KT-talvur, sum kosta tað sama sum tær hjá Formula, men tær eru ikki líka góðar.

Skúlastjórin hevur boðað umsitingini frá, at skúlin er sera áhugaður í at fáa gjørt ein fastan leist um hvussu vit gera við KT í skúlanum í framtíðini. Skal KT t.d. liggja í blokkinum ella uttanfyri blokkin.

**Ískoyti 21/5-19**
Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 24/4-19 at málið skuldi viðgerast í skúlastýrinum áðrenn støða bleiv tikin til keyp av KT-útgerð, og hetta er nú gjørt (sí skriv frá skúlastýrinum)

**Ískoyti 17/6-19**
Á seinasta býráðsfundi tann 27/5-19 bleiv samtykt at taka av tiboði frá Formula og veita eykajáttan til keypið, sum er á íalt 1 mió kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongin upphædd er sett av á fíggjarætlanini til endamálið.

**Ískoyti 17/6-19**
Á seinasta býráðsfundi tann 27/5-19 bleiv samtykt at taka av tiboði frá Formula og veita eykajáttan til keypið, sum er á íalt 1 mió kr.

**Tilmæli**

Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 08. april 2019</u>**
Mentanarnevndin mælir til at KT-úgerðin verður endurnýggja. Støðan til fígging verður tikin av fíggjarnevndini og/ella býrðnum.

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2019</u>**
Einmælt samtykt at málið skal viðgerðast í skúlastýrinum áðrenn støða verður tikin tol evt. keyp av KT-útgerð

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 21. maj 2019</u>**
Málið tikið av skrá.

Umsitingin biður um dagført tilboð, sum skulu verða tøk til býráðsfundin

**<u>Viðtøka Býráðið 27. maj 2019</u>**
Einmælt samtykt at taka av tilboðið frá Formula dagf. 23.05.2019, og veita eykajáttan til íløguna.

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð

**<u>Viðtøka Býráðið 24. juni 2019</u>**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

## 51/19 Frágreiðng og tilmæli til mál nr. 19/00396 - Demensheim

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.06.2019 | 7/19 | 19/00396-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 44/19 | 19/00396-4 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 51/19 | 19/00396-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Á býráðsfundi tann 30. apríl 2018 samtykti Eysturkommunu býráð at seta ein ráðgevandi bólk, ið skuldi "*lýsa týðandi viðurskiftir í sambandi við ætlanirnar at byggja nýtt demensheim*". Bólkurin hevur gjørt tilmæli.<br><br>Sí frágreiðing og tilmæli frá bólkinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Stýrið fyri Nánd samtykt á fundi tann 28. mai 2019 fylgjandi:<br><br>*Stýrið tekur undir við tilmælinum, og heitur á Eysturkommunu býráð at viðgera tilmælið skjótast. Stýrið heitir á Eysturkommunu, um at Nánd fær trý umboð við í annaðhvørt ein byggibólk ella ein fylgibólk, tveir stýrislimir og leiðarin. Eisini heitur Nánd á Eysturkommunu um at samskifta við Fuglafjarðar kommunu um leigukostna.* |

**Viðtøka Trivnaðarnevndin 13. juni 2019**
Meirilutin, Fríðgerð Heinesen og Brandur Jacobsen taka undir við tilmælinum hjá stýrinum í Nánd
Minnilutin, Tollakur Joensen, tekur støðu á býráðsfundinum

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at settur verður ein bólkur við 7 limum. Limirnir verða tveir stýrislimir, leiðarin í Nánd, demenssamskiparin, ein avvarandi, eitt starvsfólk og eitt umboð fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevdin.

**52/19 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00397 - Endurmenningareind**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.06.2019 | 8/19 | 19/00397-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 45/19 | 19/00397-2 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 52/19 | 19/00397-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tann 1. mars 2019 fekk stýrið eitt uppskot frá leiðsluni, um at víðka tilboðið í Doktarahúsinum í Fuglafirði, sum eina fyribilsloysn at hýsa 3-4 fólkum. Ætlanin vildi lætta um trotið á búplássum til borgarar við sjúkuni demens, meðan bíða verður eftir nýggja demensheiminum, sum Eysturkommuna skal byggja. Á fundi við Fuglafjarðar kommunu fríggjadagin tann 26. apríl, varð staðfest, at Doktarahúsið hevur ikki brunagóðkenning, og tí ikki kann hýsa búfólkum. Av somu orsøk er umlættingin í Doktarahúsinum steðga. Nú Doktarahúsið ikki er ein møgulig loysn at lætta um trýstið frá bíðilistanum, hevur verið leita eftir øðrum møguleikum. Tað eru okkum vitandi ikki tøk hús í økinum, og tí hevur verið hugt eftir møguleikum aðrastaðni.<br><br>Átrokandi støðan, ið hevur víst seg seinastu mánaðir viðv. borgarum við demenssjúku eru batnað eitt lítið vet. Tann eini borgarin við demens andaðist, og somuleiðis andaðist ein borgari á demensdeildini á Gøtubrá, so her kann ein borgari við svær demens flyta inn í næstum. Tveir aðrir borgarar við demenssjúku eru til umlætting á Vesturstovu. Tá hesir ikki kunnu fara heima aftur, fáa hesir borgarar væntandi pláss seinri. Hóast so, er bráðfeingis tørvurin støðugur. Tað standa 8 fólk á bíðilista, og bíðilistin kann væntast at økjast enn meira. Somuleiðis eru fleiri aðrir borgarar, ið javnan hava tørv á umlætting.<br><br>Tað gevur meining, at raðfesta eina endurmenningareind, har borgarar kunnu koma til endurmenning og uppvenjing í eitt tíðarskeið, fyri síðan at fara heim aftur. Eitt tílíkt tilboð kann viðvirka til, at borgarar kunnu verða longri heima í egnum heimi. Ovaru hæddirnar í húsinum í Leirvík, har venjingarhølini hjá Nánd eru, eru væl egnaði til eina endurmenningareind (rehabiliteringseind), og tað gevur góða meining fyri borgarar í økinum, at staðseta tilboðið her. Umframt venjingarumstøður, so er góður fakligur førleiki eisini í húsinum. Sjúkrarøktarfrøðingar, heimahjálpir, fysioterapeutur og ergoterapeutur. Tað er upplagt, at deildarleiðarin fyri Miðstøðina fær leiðslu av |

endurmenningareindini. Mælt verður til at gera hølini í stand til at hýsa 4-6 borgarum, og um somu tíð at betra hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum.

Tørvur er á, at finna eina fyribilsloysn, meðan bíða verður eftir hølunum í Leirvík, og tí verður mælt til, at leiga niðastu hædd frá Hotel Runavík til endurmenningareind. Leiðarin á Nánd, Mariannu Hansen, tørvsmeti og Elsebeth Simonsen, deildarleiðara, hava kanna hesar hølisumstøðurnar nærri. Hotel Runavík liggur tætt við ERE, sum vit vænta at kunna keypa tænastur frá. Møguleiki er at hava upp til 3 fólk til endurmenning á niðastu hæddini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Kostnaður áleið um leiga verður á Hotel Runavík

| | |
|---|---|
| 1,5x dagvakt | kr. 1.053.000 (heilsuhjálpari og fysiterapeut) |
| 1,5x kvøldvakt | kr. 1.275.000 (heilsuhjálpari og røktari) |
| 1x náttarvakt | kr. 798.000 (Heilsuhjálpari) |
| Rakstur | kr. 200.000 |
| Hølisleiga | kr. 480.000 (íroknað el og olju) |
| Umvæling | kr. 100.000 (so sum køk) |
| Umlætting 3 pláss | kr. – 100.000 |
| Tilsaman eitt ár | kr. 3.806.000 |
| **Tilsaman sep - des 19** | **kr. 1.268.700** |

Gjald pr. íbúgva 67+

Tað eru tilsaman 534 íbúgvar í økinum. Tað er kr. 7.127,- pr. íbúgva pr. ár.

Eyka útreiðslur

**Eysturkommuna** hevur 283 íbúgvar. Frá 1. september til 31. desember:**kr. 672.312**

(Pr. ár kr. 2.016.941)

**Fuglafjarðar kommuna** hevur 251 íbúgvar.

Frá 1. september til 31. desember: **kr. 596.292**

| |
|---|
| (Pr. ár kr. 1.788.877) |
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Stýrið hjá Nánd, hevur á fundi 28. mai 2019 samtykt fylgjandi:<br>*Stýrið tekur undir við at gera eina menningareind í húsinum hjá "Rasmus" í Leirvík, og heitir á Eysturkommunu um at kannað møguleikarnar skjótast gjørligt.*<br>*Viðv. at leiga Hotel Runavík, heldur stýrið, at henda loysn er ov dýr, og vil heldur seta ferð á at gera menningareindina í Leirvík*. |

**Viðtøka Trivnaðarnevndin 13. juni 2019**
Trivnaðarnevdin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá stýrinum í Nánd

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**53/19 Mál 19/00413 uppmáting við dronu av havnalagnum í Leirvík. Málslýsing og tilmæli.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 13.06.2019 | 22/19 | 19/00413-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 20.06.2019 | 50/19 | 19/00413-1 |
| 3 Býráðið | 24.06.2019 | 53/19 | 19/00413-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við mál 19/00199 (Umsókn um loyvi at gera skrivstovubygning og og íbúðir) ynskti Vinnunevndin at visualisera í 3D, hvørja ávirkan bygningurin hevur á økinum og hvussu útsýnið m.a. norður í Djúpini ávirkast.<br><br>Ein fyritøka hevur givið tilboð upp á at máta alt havnalagið í Leirvík av við dronu. Kostnaðurin fyri uppmátingina er 79.000 kr. + mvg.<br>Endamálið við dronu er at gera 3D tilfar, sum kann brúkast til støðutakan av ymsum málum, serliga innanfyri bygging og býarskipan. Við hesum tilfari ber eitt nú til at staðfesta, um útsýni ávirkast av einum ætlaðum bygningi, ella hvussu ein nýbygging tekur seg út í lendinum/nærumhvørvinum.<br><br>Bygningurin í mál 19/00199 er ikki tann einasti bygningurin sum er í umbúna á økinum. Visualisering av Kráartanga er eisini við í tilboðnum, og tá møguligir vinnubygningar skulu gerast har, so klára vit eisini at visualisera teir á sama hátt. Harumframt er umsókn um stóran bygning við gomlu ferjuleguna komin inn (mál 19/00417 Umsókn um vinnustykki til gistingarhús).<br><br>Viðmerkjast skal eisini, at tær umsóknir sum eru innkomnar halda seg til loyvdu hæddina í byggisamtyktini fyri økið. Loyvda hæddin er 10 metrar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongin upphædd er sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2019. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka av tilboðnum og veita eina eykajáttan á 100.000 kr. til endamálið. Orsøkin til upphæddina á 100.000 kr. er, at væntast skulu eyka útreiðslur til viðger av teimum data vit fáa frá fyritøkuni. |

**Viðtøka Vinnunevndin 13. juni 2019**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at veita eina eykajáttan á 100.000 kr. til endamálið.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. juni 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og veita eykajáttan á 100.000,00 kr. peninurin verður tikin av innistandandi.

**<u>Viðtøka Býráðið 24. juni 2019</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**54/19 Mál 19/00417 Umsókn um vinnustykki til gistingarhús. Málslýsing og tilmæli**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Vinnunevndin | 13.06.2019 | 24/19 | 19/00417-3 |
| 2 Býráðið | 24.06.2019 | 54/19 | 19/00417-3 |

**Málslýsing:**

Inn er komin umsókn, frá partafelagi undir stovnan, um vinnustykki til gistingarhús við gomlu ferjuleguna í Leirvík.
Økið við gomlu ferjuleguna er sbrt. byggisamtyktini, eitt C2 vinnustykki (Vinnu- og miðstaðarbygging við serstakari byggisamtykt).

Talan er um bygning sum hevur brutto mál longd á 58 metrar og breidd á 19,6 metrar. Bygningurin verður i trimum hæddum á tríggjar metrar og so eitt tak. Stigtakararnir siga, at samlaða hæddin á bygninginum verður 10 - 11 metrar alt eftir hvat teir fáa loyvi til. Sbrt. byggisamtyktini fyri Eysturkommunu kunnu bygningar á einum C2 vinnustykki í mesta lagi verða 10 metrar høgir.

Stigtakararnir hava mett um staðseting, men eru ikki bundnir at hesari, um kommunan ynskir at flyta bygningin. Fyri stigtakararnar hevur tað týdning, at tað er gott pláss uttan um bygningin og at útsýni norður eftir og niður í bátahylin verður varðveit.

Aðrar vinnufyritøkur eru eisini í økinum, og hædd má takast fyri verandi virksemi í økinum. Eitt nú leigar ein fyritøka økið longri úti á grótpirinum, beint uttanfyri gomlu ferjuleguna. Her má hædd takast fyri, hvussu vit samskipa økið.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Økið stigtakararnir biðja um er eitt leiguøki. Gjaldið 16,50 kr./$m^2$.

**Tilmæli**

Mælt verður í fyrstu atløgu til at ganga umsóknini á møti, tí eitt gistingarhús fer at vaksa um fjølbroytta vinnulívið í Eysturkommunu. Ferðavinnan hevur veruliga tikið dik á seg seinnu árini, og við einum gistingarhúsi í Eysturkommunu, kann lokala vinnulívið fáa sín lut í hesari vinnuni.

Mælt verður samstundis til, at tekniska umsiting byggimálsviðgerð umsóknina, og at umsitingin annars fær høvi at samskipa hesa verkætlanina, saman við verandi virksemi á økinum.

**Viðtøka Vinnunevndin 13. juni 2019**

Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at ganga umsóknini um vinnustykki á møti.

Gudny Langgaard var úti undir viðgerðini.

**<u>Viðtøka Býráðið 24. juni 2019</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.
Gudny Langgard var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

**55/19 Sáttmáli um skúlasamstarv við Fuglafjarðar kommunu - endurskoðaður**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2019 | 51/19 | 19/00432-12 |
| 2 Býráðið | 24.06.2019 | 55/19 | 19/00432-12 |

**Málslýsing:**

Tann 21/8-17 samtykt býráðið í Eysturkommunu sáttmála um framhaldsdeild (Framvit) millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu. Sáttmálin bleiv síðani sendur Mentamálaráðnum (MMR) til góðkenningar, men MMR kundi ikki góðkenna sáttmálan, tí mett var ikki at hesin var heimilaður í Fólkaskúlalógini.

MMR hevur síðani víst á hvat skal/kann broytast fyri ar sáttmálin kann verða góðkendur og eisini er lógin broytt síðani 2017.

Nýggjur sáttmáli við broytingum fyriliggur nú. Í hesum uppskoti til sáttmála eru fleir smáar/málsligar broytingar, men høvuðsbroytingarnar í mun til sáttmálan, sum var samtyktur av býráðnum í august í 2017 hesar:

- Eysturkommuna fær eitt politiskt umboð í skúlastýrið, hetta var eisini ásett í sáttmálanum frá august í 2017, men MMR metti ikki at heimild var fyri hesum í Fólkaskúlalógini, men lógin er nú brott soleiðis at heimild er fyri hesum
- Foreldraumboðini verða vald eins og tey hevur verið samb. fólkaskúlalógini, t.v.s at øll foreldur, eisini tey í Eysturkommunu skulu til Fuglafjarðar at velja, í sáttmálanum frá august 2017 var tað ásett at Eysturkommuna átti eitt forledraumboð, sum bleiv valt í Eysturkomunu.
- Kommunurnar í skúlasamstarvinum velja eitt stýri, sum umsitur fyrisiting og rakstur hjá framhaldsdeildini, hetta var ikki við í sáttmálanum frá august 2017.

Allar broytingarnar í mun til sáttmálauppskotið frá 2017, síggjast í hjál. skjali.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Viðtøka Mentanarnevndin 13. juni 2019**
Mentanarnevndin mælir til at taka undir við sáttmálanum.

**Viðtøka Býráðið 24. juni 2019**
Málið tikið av skrá.

fundurin lokin kl. 23.30

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Marita Klein Joensen

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Fríðgerð Heinesen